# Mourinho vil ikki venja Ongland

Síðani enska fótbóltslandsliðið tapti fyri Russlandi í farnu viku, hava fjølmiðlarnar róð fram undir, at venjarin Steve McLaren skal sekkjast. Síðani hevur verið spekulerað um, hvør ein møguligur avloysari skal verða, og ein av teimum, sum hevur verið nevndur, er Jose Mourinho, sum fyri kortum fór úr starvinum sum venjari hjá Chelsea. Men Mourinho sjálvur vil ikki hoyra talan um hetta. - Eg kann ikki ímynda mær, at eg fari at venja nakað annað landslið enn tað portugisiska, sigur Jose Mourinho.



# Royal League í klø
num trái

Norðurlendska vetrarkappingin í fótbólti, Royal League, liggur tungt í sjónum. Áhugin fyri kappingini hevur ikki verið tann stóri millum áskoðararnar, og nú er ivasamt, um nøkur veruliga avtala um sjónvarsrættindi fæst. Samráðingarnar eru stegðaðar, og í Noregi hava tey einki mót um framtíðina hjá kappingini. Stjórin fyri kappingina, Børge Bach, vil tó ikki gera enda á kappingini enn. Hann hevur framvegis vónir um, at tað skal lata seg gera, at fáa eina sjónvarpsavtalu.

HB-KÍ 1-1 (0-0):

# Tað gjørdist lívligt eftir steðgin

**KÍ hevði gyltan kjans at økja til 2-0, men HB, sum hevði misnýtt fleiri góðar kjansir, kláraði at javna móti endanum av dystinum, har KÍ fekk toppskjúttin vístan av vøllinum fyri ógvusliga takkling**

FORMULADEILDIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*HB*

*KÍ*



*HB og KÍ spældu ein lívligan seinna hálvleik í Gundadali í gjár, og tá skoraðu liðini hvør sítt mál*

Mest vinnandi feløgini í føroyskum fótbólti spældu ein heldur týdningarleysan dyst í skugganum av FM-dystinum í Runavík. HB hevði undan dystinum ein kjans at vinna bronsu, meðan Kí í besta føri kann náa fimta plássi í Formuladeildini.

Fyrri hálvleikur var eitt sindur merktur av hesum, men í seinna hálvleiki kom veruligt lív í dystin, og tá lógu bæði liðini fram við eftir sigrinum.

Í fyrra hálvleiki hevði HB leikliga yvirvág, men KÍ var væl við í dystinum. Rógvi Jacobsen hevði onkra roynd, Andrew av Fløtum royndi eisini, og Tróndur Vatnhamar hevði tvær frálíkar bjargingar, sum forðaðu fyri, at KÍ skoraði.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki tók HB alsamt meira yvir, og eina løtu trýstu teir veruliga gestirnar úr Klaksvík. Hesa løtuna var tað serliga ein stórspælandi Meinhardt Joensen í KÍ-málinum, sum forðaði fyri einum HB-máli. Í einu støðuni hevði Meinhardt eina framúr góða dupultbjarging.

KÍ fótaði sær tó aftur, og seinastu løtuna fyri hálvleikssteðgin høvdu teir bláu fingið betur tamarhald á sínum spælið, og teir spældu viðaftur.

## KÍ á odda

Í seinna hálvleiki kom KÍ betur inn í dystin, og eina góða løtu hevði KÍ gott tak á støðuni. HB hevði onkrar kontrakjansir, og aftur var tað Meinhardt Joensen, sum vísti seg frá síni góðu síðu, tá millum annað Andrew av Fløtum var leysur.

KÍ legði seg á odda góðar 10 minttir eftir steðgin. Fríspark varð sent inn í brotsteigin, bólturin ferðist millum fleiri, og so kom stríðsmaðurin Símun Joensen at standa væl fyri, og hann smekkað bóltin í málið til 1-0. Símun hevur júst havt leikbann í tríggjar dystir, men hann stóð sterkur í myndini hesaferð.

Eftir hetta setti HB seg so líðandi meira á dystin. Teir sendu nógvar bóltar inn í brotsteigin, men ofta var verjan ella málmaðurin fyri, og onkuntíð kom tað fyri, at bólturin ferðaðist fram við øllum og út av baklinjuni.

KÍ fekk ein gyltan møguleika at skora, tá raski og vælspælandi Kristoffur Jakobsen fór fram við fleiri og legði upp á tvørs til ein blankan Heðin á Lakjuni. Hann dró inn í brotsteigin, men Tróndur Vatnhamar stórbjargaði við eini fótparadu.

## KÍ misti ein mann

Toppskjúttin hjá KÍ, Paul Clapson, gjørdi støðuna hjá sínum liði verri, tá hann fekk reyða kortið 20 minuttir fyri tíð. Takklingin av Rókur av Fløtum var ógvuslig, og dómarin gav honum beinleiðis reytt kort. Eftir hetta legði KÍ stóran dent á verjupartin, og tað var bert í mótálopum, at klaksvíkingarnir hóttu.

Tað sá leingi út til at fara at eydnast KÍ at vinna dystin, men fýra minuttir fyri tíð javnaði HB. Eitt fríspark var sent inn í brotsteigin, KÍ-málverjin fór skeivur av innlegginum, sum broytti kós í vindinum, og tá bólturin datt fyri føturnar á Andrew av Fløtum, kundi hann ikki gera annað enn at senda bóltin í tóma málið til 1-1.

Eftir hetta royndi HB at fáa vinnandi málið, men tað eydnaðist ikki, og KÍ'arnir vóru sera misnøgdir tá linjuverjin í yvirtíðini veitraði ein púra leysan Kristoffut Jakobsen rangstaddan.

Hóast tað ikki var stórvegis at spæla um, royndu bæði HB og KÍ at skapa ein góðan dyst. Bæði liðini vildu vinna, og tey máttu noyðast við ein javnleik.

# Áki gjørdi mun í Japan

**Danski landsliðsvenjarin í koyristólsfótbólti er væl nøgdur við avrikið hjá føroyska spælaranum á danska landsliðnum**

HM
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyingurin Áki Joensen, sum er búsitandi í Aalborg, er ein av spælarunum á danska landsliðnum í koyristólsfótbólti. Hetta er eitt serligt slag av fótbólti fyri tey, sum sita í koyristóli. Serligar reglur er fyri dystirnar, sum verða spældir á innanduravølli á stødd við ein kurvabóltsvøll.

Danska landsliðið hevur júst verið til HM í Japan, og har gekk tað hampuligt hjá danska liðnum.

Danmark kom tíverri ikki í hálvfinalurnar, sum liðið hevði ætlað sær, men úrslitið í HM var heiðurligt, og spælararnir fóru væl nøgdir heim aftur. Endaliga støðan gjørdist eitt sætta pláss í kappingini.

Landsliðsvenjarin Niels Rossing letur væl at avrikinum hjá føroyska spælaranum á liðnum.

- Áki er ein týdningarmikil spælari hjá okkum. Hann er altíð í góðum lag, og hann dugir at skapa góðan stemning í hópinum. Hann er eisini drúgvur á vøllinum, har hann er serliga góður í verjuspælinum. Í dystinum ímóti Ongland var hann mest sum ein múrur frammanfyri okkara mál, og Ongland fekk bert eitt mál í hesum dystinum, sigur Niels Rossing.

Ein annar týðandi spælari á danska liðnum er liðformaðurin Michael Jensen, sum var kosin til besta spælaran í kappingini.